# Forseti á ákærubonkinum

Fyrrverandi liberiski forsetin Charles Taylor kemur nú fyri krígsbrotsmannadómstólin í Haag. Har er hann ákærdur fyri at hava viðvirkað til ræðuleikar í tí ellivu ára langa borgarakrígnum í grannalandinum Sierra Leone frá 1991 til 2002. Charles Taylor er ákærdur fyri yvirgang, dráp, neyðtøku og píning, men hann noktar seg sekan. Hann er tann fyrsti afrikanski ríkisleiðarin, sum kemur fyri ein altjóða krígsbrotsmannadómstól. Roknað verður við, at rættarmálið ímóti honum fer at vara hálvtannað ár. Upprunaliga var ætlanin, at Charles Taylor skuldi koma fyri rættin í Sierra Leone, men myndugleikarnir har bóru ótta fyri, at málið kundi elva til ófrið, og tí bleiv tað flutt til Haag.



# Nógvir falskir evruseðlar

Altsamt fleiri royna at falsa evruseðlar. Evropeiski Miðbankin kunngjørdi í gjár, at fyrra hálvár vórðu ikki færri enn 413.000 seðlar tiknir úr umfari, tí teir vístu seg at vera falskir, og tað er 17 prosent fleiri enn fyrra hálvár í fjør, sigur bankin. Tað eru serliga 20-evru-seðlarnir, sum verða falsaðir, og fyrra hálvár komu næstan 50 prosent fleiri falskir 20-evru-seðlar á marknaðin enn somu mánaðir í fjør. Evropeiski Miðbankin vísir á, at tað seinasta árið hava í meðal 12,5 milliardir evruseðlar verið í umfari, so í veruleikanum er talið á falsaðum seðlum ógvuliga lítið, sigur bankin.

# avgerðin



*Hans Pauli Strøm var á skrivstovu síni í morgun og pakkaði og beyð starvsfólkinum farvæl, eftir at hann nú hevur lagt frá sær sum landsstýrismaður*